# ítróttur

Nr. 31 • hósdagur • 14. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Christian stillar ikki upp




*Formaðurin í HB sigur, at tað hevur einki við persónin, Christian Andreasen, at gera, at HB saman við AB nú hevur tikið sín stuðul til uppstillingina aftur*

**Eftir at tað um vikuskiftið tóktist greitt, at nýggi fótbóltsbossurin í Føroyum fór at eita Christian Andreasen, er støðan í dag ein heilt onnur. Christian hevur nevnliga boðað frá, at hann als ikki fer at stilla upp til formansvalið**

FÓTBÓLTSPOLITIKKUR
*Jákup Mørk*

Í týsdagsblaðnum skrivaðu vit, at tað næstan við vissu kundi sigast, at Christian Andreasen skuldi gerast nýggjur formaður í Fótbóltssambandinum aftan á aðalfundin, sum verður hildin annan leygardag.

Fleiri feløg høvdu um vikuskiftið fundast, og úrslitið av hesum tóktist eftir øllum at døma at vera, at ein meiriluti av føroysku fótbóltsfeløgunum bakkaðu upp kring Christian. Sjálvur segði Christian tá, at hann enn ikki hevði tikið endaliga avgerð, um hann fór at stilla upp, men hann væntaði tó, at um hann kendi ein nóg stóran uppbakning, so ætlaði hann at ganga áheitanini á møti. Og við undirtøkuni, sum tóktist at vera um vikuskifti, so átti hetta eftir øllum at døma ikki at veri nakar trupulleiki. Tí fóru flestu luttakararnir av fundinum við teirri fatan, at teir longu høvdu kjósað sær nýggjan formann.

## Stillar ikki upp

Tað fór tí sum ein ylur kring leiðararnar í ymsu feløgunum, tá Christian Andreasen fyrradagin boðaði frá, at hann ikki ætlaði sær at stilla upp.

- Eg havi tikið avgerð um, at eg ikki stilli upp, og tann avgerðin er endalig, var einasta viðmerkingin, sum Christian Andreasen sjálvur hevði til málið.

Tað er ikki frítt, at hetta hevur ørkymlað føroysku fótbóltshøvdingarnar. Eingin hevur alment úttalað seg um orsøkina til hetta, men tað verður teskað hart í krókunum um, at høvuðsorsøkin til hetta er, at HB og AB hava tikið sín stuðul til hendan bólkin aftur.

Formaðurin í HB váttar eisini, at feløgini hava hava tikið sín stuðul aftur, men Birgir Enghamar, formaður í felagnum, sigur, at tað á ongan hátt hevur við persónin, Christian Andreasen at gera.

- Vit vóru sjálvandi ein partur av málinum, og saman við fleiri øðrum feløgum hava vit prátað um nakrar møguleikar í sambandi við formansvali. Sum tíðin hevur liðið, so er okkara støða í málinum tó broytt. Vit dugdu ikki at síggja nakrar fyrimunir í hesum, og tí gjørdu vit av at taka okkara stuðul aftur, sigur Birgir, sum annars ikki ætlar sær út í nakað víðari kjak í fjølmiðlunum um evnið.

Allan týsdagin tóktist luftin annars at vera tjúkk av ákærum um, at tað ikki var formaðurin, men aðrar kreftir í havnarfelagnum, sum høvdu tikið avgerðina og onkursvegna kroyst hesa oman yvir formannin. Men hetta hevur sambært formanninum als ikki verið upp á tal.

- Tað er fyrst og fremst formaðurin, sum hevur tikið avgerðina. Í hesum førinum saman við næstformanninum, sigur ein avgjørdur Birgir Enghamar, tá hetta verður havt at munni.

## Dánjal fer solo

Freistin at stilla valevni til formans- og nevndarvalið er úti á midnátt hóskvøldið - og ikki mikukvøldið sum vit annars hava skrivað - men í løtuni er ikki líkt til, at hetta verður av nøkrum.

Einasta valevnið, sum hevur verið nevnt, tá sæð verður burtur frá valevninum hjá nevndini í FSF, Dánjali Andreasen, og so Christiani Andreasen, er Ísak Mikladal, men tað er tó ikki líkt til, at hann kemur upp á tal, og tað er heldur ikki víst, at hann tók av einari áheitan, um ein slík skuldi komið við postinum í dag.

Tískil verður støðan annan leygardag helst tann, at talan als ikki verður um tann valdystin, sum fleiri annars høvdu væntað, eftir at Torleif Sigurðsson fyri skjótt hálvum ári síðani boðaði frá, at hann nú gavst sum FSF-formaður. Talan verður helst bert um tann eina kandidatin, og kann Dánjal Andreasen úr Leirvík tí helst longu byrja at fyrireika seg til eina nýggja tilveru sum formaður í FSF. Nakar óroyndur maður er Dánjal á ongan hátt í fótbóltshøpi. Hann hevur í drúgt áramál røkt ymsar nevndarsessir í Fótbóltssambandinum, har hann í løtuni er limur í fíggjar- og landsliðsnevndini.

Seinasta orðið er tó kanska ikki sagt í málinum. Tað er eingin loyna, at fleiri feløg fegin hava sæð eina ávísa útskifting í nevndunum í fótbóltssambandinum, og tað er einki at ivast í, at telefonirnar kring landið fara at kima dúgliga hetta fram til hóskvøldið. Tað má tó metast sum ógvuliga ivasamt, um hetta er nóg mikið til at mobilisera kreftirnar, sum tað so populert verður sagt í hesum valdøgum. Fá ella møgulig eingi uppløgd valevni tykjast vera at taka av, og spurningurin tykist vera, hvørt tað yvir høvur fer at eydnast teimum at finna nakran, sum torir at taka dystin upp við leirvíkingin, sum í løtuni tykist hava besta takið á formansstólinum.

**-jm**



VÍF-Stjørnan 22-18 (14-9):

# Minti um endurtøku



*Eina løtu høvdu tær úr Stjørnuni tak á, men at enda gekk alt sum vant, og VÍF vann ein tryggan sigur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eins og í steypafinaluni, so gjørdi Stjørnan ein vørr fyrstu løtuna móti VÍF, men alt í alt var meistaraliðið alt ov sterkt fyri avbjóðaran**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Tað var toppdystur á skránni í Vestmanna týskvøldið. Stjørnan kom á vitjan hjá VÍF, og hóast tað neyvan kundi roknast við nøkrum øðrum enn sigri til heimaliðið, so var talan um næst fremsta liðið, og tí kundi ein góður dystur kanska væntast. Vónirnar til spenningin mundu tó vera skerdar nakað, tí Stjørnan mátti vera skaddu Andrijanu Milodanovic fyriuttan, eins og toppskjúttin á liðnum, Simona Dziugyte, ikki var 100%, tó at hon var við í hópinum. Hinvegin vóru meistararnir eisini nakað skerdir, tí Nicolina Radu ikki var við í hópinum, eins og Jórun Ludvig neyvan spælir meira í ár, men hópurin hjá teimum tykist tó vera nakað væl sterkari enn hjá øllum øðrum.

## Líktist finaluni

Fyrstu løtuna av dystinum tóktist tað tó, sum legði Stjørnan vertin á hetta. Við ágangandi álopsspælið royndu tær at bróta ígjøgnum annars sterku VÍF-verjuna, og til tíðir eydnaðist hetta heilt væl. Í verjupartinum løgdu tær nógv fyri í royndunum at steðga skjúttunum hjá VÍF. Nakað, sum kanska viðførdi, at tað ofta gjørdist opið inni á strikuni, men so leingi sum Stjørnan helt fast, tóktist hetta kortini ikki at bila.

Eins og í steypafinaluni fyri 10 døgum síðani, so helt trýstið hjá Stjørnuni tó ikki allan dystin. Seinasta triðingin av fyrra hálvleiki hendi nevnliga akkurát tað sama, sum gjørdi seg galdandi í finaludystinum. Luftin hjá Stjørnuni tóktist at ganga undan í mun til meistararnar, og í tølum gekk tað nett soleiðis, sum tað gjørdi í finaludystinum.

Hóast Stjørnan eitt langt skifti var í yvirtali, so megnaðu tær ikki at toga seg frá heimaliðnum, og tá støðan so nakrar minuttir seinni var hin øvugta, punkteraði VÍF fullkomuliga dystin. Seks mál á rað syrgdu fyri eini tryggari leiðslu í hálvleikinum, og í seinna hálvleiki kom hendan ongan tíð í vanda. Tvørtur ímóti hóttu tær eina lítla løtu við sonnum stórsigri, og eitt skifti vóru átta mál á muni. Spakuliga fór ferðin tó av hjá teimum, og Stjørnan slapp at pynta um úrslitið, tó at tær ongan tíð komu í nær námind einum sigri.

## Staðfestu gullið

Var tað ikki staðfest undan dystinum, so er tað í øllum førum ein sannroynd nú, at VÍF aftur í ár verður meistari.

Liðið er so væl og virðiliga hitt sterkasta í landinum, og tó at skaðar av ymsum slag gera um seg, so tykjast tær á liðnum á ongan hátt at missa mótið. Hópurin er nóg breiður til at taka nakrar skaðar, og venjingarstøðan tykist vera somikið góð, at tað nærum ikki er neyðugt við útskiftingum. Stigatalvan tosar eisini sítt týðiliga mál, tí hóast tær eru tað liðið, sum hevur leikt fægstar dystir, so eru tær heilti fimm stig undan næsta liðnum, so alt í alt tykist tað bert vera ein formalitetur, nær tær tryggja sær heitið við matematiskari vissu.

Hjá Stjørnuni er støðan eitt sindur øðrvísi. Leingi var líkt til, at tær skuldu vinna silvurið eins trygt, sum VÍF vinnur gullið, men eftir tapið fyri VB er hetta als ikki so vist longur. Tær koma í øllum førum at stríðast fyri hesum, men stóri spurningurin tykist vera, í hvønn mun skaðarnir framvegis gera um seg, tá útidystirnir móti VB og Neistanum verða á skránni komandi tíðina.

## Dysturin í tølum

**VÍF-Stjørnan 22-18 (14-9)**

Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 5, Jacklin Durhuus 5, Ioana Rápa 5, Alis Høghamar 4, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 2, Fríða Marjunardóttir 1
Stjørnan: Simona Dziugyte 8(4), Joan M. Joensen 4(2), Anna Kristina Samson 3, Una Olsen 2, Beinta Klakstein 1
Brotskøst: VÍF 3, Stjørnan 9
Útvísingar: VÍF 6, Stjørnan 5
Dómarar úr Neistanum:
Hjalmar Petersen & Kristian Johansen. Greiddu sum heild uppgávuna væl, tó at oyruni kanska vóru heldur stór í einstøkum førum.

## Stigatalvur

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 465 | 283 | 182 | 20 |
| 2 | Stjørnan | 5 | 3 - 0 - 2 | 434 | 355 | 79 | 15 |
| 3 | Neistin | 6 | 3 - 1 - 2 | 400 | 351 | 49 | 15 |
| 4 | VB | 5 | 4 - 1 - 0 | 397 | 395 | 2 | 15 |
| 5 | StÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 321 | 402 | -81 | 5 |
| 6 | Sóljan | 6 | 1 - 0 - 5 | 330 | 499 | -169 | 4 |
| 7 | Kyndil | 5 | 0 - 0 - 5 | 392 | 454 | -62 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 470 | 386 | 84 | 19 |
| 2 | Neistin | 5 | 3 - 0 - 2 | 523 | 446 | 77 | 16 |
| 3 | StÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 470 | 454 | 16 | 14 |
| 4 | H71 | 5 | 0 - 2 - 3 | 470 | 498 | -28 | 8 |
| 5 | Tjaldur | 5 | 2 - 0 - 3 | 423 | 478 | -55 | 8 |
| 6 | Kyndil | 5 | 2 - 1 - 2 | 395 | 441 | -46 | 7 |
| 7 | KÍF | 5 | 0 - 1 - 4 | 447 | 495 | -48 | 5 |

# Kyndil í Vestmanna




**Hóskvøldið fara sigursvandu liðini hjá VÍF og Kyndli at takast í Ítróttarhøllini í Vestmanna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóskvøldið fara bæði menn og kvinnur hjá VÍF og Kyndli at takast. Hjá monnunum er einki at ivast í, at hetta er hin stóri klassikarin í hondbóltskappingini, men úrslitini í ár hava tó víst, at klassikarin ikki longur er tað, sum hann var.

VÍF vann eisini trygt í báðum dystunum móti Kyndli í grundspælinum, og tó at Kyndil í nógv størri mun hevur fingið glið á spælið í endaspælinum, so eru teir á heimaliðnum at meta sum greiðir favorittar undan dystinum.

Tað eru kvinnurnar á heimaliðnum eisini, og tað í nógv størri mun. Tað tykist sera ilt at fáa eyga á nakran, sum kann forða teimum í at fáa fult stigatal aftur í ár, og kanska minst av øllum, tá talan er um niðasta liðið á stigatalvuni, sum vitjar.

Kvinnudysturin verður leiktur klokkan 18.30, og kl. 20.00 fara so menninir í gongd.